## Yvirskot á Skipasmiðjuni

Tórshavnar Skipasmiðja hevði í fyrsta roknskaparári sínum eitt yvirskot á 7.343 tkr. Av samlaðu fíggjajavnvágini upp á 164.066 tkr. var eginognin við árslok 2005 70.185 tkr. Hetta svarar til ein soliditet á 43%. Úrslitið er á leið tað, sum hevur verið galdandi hjá núverandi P/F 14, sum áður bar navnið, Tórshavnar Skipasmiða.

## Postverkið hevði 4,2 mió eftir

Fyrsti ársroknskapurin hjá P/F Postverki Føroya er nú gjørdur. Hóast nýggja partafelagið ikki fór at virka fyrr enn í desember mánaði í fjør, so fevnir ársroknskapurin um alt 2005. Hetta tí raksturin varð skotin inn í nýggja felagið, tá endaliga umleggingin varð framd.

Og higartil tykist gongdin at vera positiv. Hóast talan í árinum var um óvanligar útreiðslur á 4.345 tkr., so sýnir roknskapurin eitt ársúrslit á 4.279 tkr. eftir skatt. Samlaði eginpengurin er nú 47.279 tkr., harav innskotni partapeningurin er 43 mio kr.



*Starvsfólkið skrivstovuni hjá Sansum í Keypmannahavn f.v. Thomas Altamirano, Cathrine Lippert, Høgni Rasmussen og Haidi Damborg Hald*

# Virksemið í Danmark er til gagns fyri føroyska viðskiftafólkið

**– Eg eri sannførdur um, at vit kunnu geva føroyska marknaðinum okkurt eyka, við eisini at vera á danska marknaðinum, sigur Høgni Rasmussen stjóri í Sansum, sum hevur latið deild upp í Keypmannahavn**

KUNNINGARVIRKSEMI
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Kunningarfyritøkan Sansir læt í september upp skrivstovu í Keypmannahavn. Í leigaðu hølunum á Vodroffsvej á Frederiksberg sita í løtuni stjórin Høgni Rasmussen og fýra donsk starvsfólk, og hóast talið av donskum viðskiftafólki ikki er stórt enn, so hava tey øll úr at gera.

– Eg haldi, at hetta er eitt náttúrligt stig fyri okkum, sigur Høgni og rættir mær eina fløsku av vatni yvir um skrivaraborið á skrivstovuni, ið hann deilir við Cathrine Lippert.

Í hølunum við síðuna av sita grafisku sniðgevarnir Thomas Altamirano og Haidi Damborg Hald, vanliga situr eisini Mette Rasmussen har, men í dag er hon við hús vegna sjúku.

– Í Føroyum er bert ein máti at veksa sum fyritøka, tað er við at spjaða seg til ymisk virkisøki, og tað hava vit gjørt, og samstundis er føroyski marknaðurin vaksin almikið. Tá vit byrjaðu í 1995 vóru vit trý fólk, í 2001 vóru vit sjey fólk, í 2004 vóru vit umleið fimtan og nú eru vit eini tretivu fólk og eru sperd við arbeiði, greiðir Høgni frá.

### Manglaðu kvalifiseraða arbeiðsmegi

– Tað er trupult at finna nóg mikið av kvalifiseraði arbeiðsmegi í Føroyum. Tí hava vit leitað uttanlands. Vit hava longu havt fleiri danir at arbeitt fyri okkum í Føroyum, Thomas, ið situr inni við síðuna av og Mette Rasmussen, hava arbeitt í Føroyum seinasta árið. Haidi, ið situr her nú, fer í næstum til Føroyar at vera eitt hálvt ár, greiðir Høgni frá.

– Tað eru fleiri fyrimunir við, at hava eina deild í Danmark við øðrum dugnaligum starvsfólki, ið hevur aðra bakgrund enn tey, ið vit hava í Føroyum. Hetta gevur eisini føroyska starvsfólkinum íblástur, ið førir til størri kreativitet. Hetta merkja vit longu, nú fólk hevur ferðast ímillum Føroyar og Danmark. Eg eri sannførdur um, at vit kunnu geva føroyska marknaðinum okkurt eyka, við eisini at vera á danska marknaðinum.



*Eini 100 fólk komu saman til samkomuna, ið Sansir skipaði fyri á Norður Bryggjuni*

*mynd: Sansir*

Sansir hevur uppliva, at tað er trupult at halda útlendsku arbeiðsorkuni í Føroyum í longri tíðarskeið. Fólk leingist heim aftur og rýmir tí.

– At geva fólki møguleikan at starvast á okkara skrivstovu í Danmark er einasti møguleiki vit hava, skulu vit ikki missa starvsfólkið aftur, sigur Høgni.

### Vilja inn á danska marknaðin

Í løtuni situr starvsfólkið í Keypmannahavn mest og ger arbeiði fyri viðskiftafólk í Føroyum, og hetta fer væntandi altíð at vera ein stórur partur av arbeiðinum á skrivstovini í Keypmannahavn. Men samstundis verður arbeitt fyri at koma inn á danska marknaðin.

Høgni Rasmussen og Cathrine Lippert fáast mest sum bert við sølufremjandi virksemi í Danmark.

– Vit sita ikki og ringja til viðskiftafólk og royna at selja teimum okkurt. Í staðin royna vit at skapa netverk, ið ger fólk varð við okkum, og hetta kann síðan føra til sølu. Tað er greitt, at tað hevði verið ov dýrt, skuldu vit farið inn á danska kunningarmarknaðin við lýsingarátøkum, so ístaðin royna vit at gera málrættaða marknaðarføring vendari móti teimum røttu fólkunum. Vit royna at skapa eitt kunningarnetverk, har vit bjóða fólki í kunningarvinnuni nakrar upplivingar, sigur Høgni. Hetta kunnu vera fakligar upplivingar men eisini av meira sosialum slag. Eitt nú bjóðaðu vit nógvum fólki á konsertina við Eivør í Tivoli.

### Løgdu lunnar undir netverk

Fyrsta tiltakið av hesum slag var á Norður Bryggjuni í Keypmannahavn dagin fyri konsertina við Eivør í